# Myndaseyming í Ribarhúsi

Í apríl í ár verður Ribarhús í Fuglafirði karmur um eitt áhugavert listaligt skeið í myndaseyming.

Kenda danska listakvinnan Solvejg Refslund fer at undirvísa, og eingin tekur hana, tá ið tað kemur til skeið av hesum slagi.

Solvejg er "sjálvlærd" og hevur torað sera væl at gingið nýggjar og spennandi leiðir, og hevur verið ófør at funnið øðrvísi mátar at gera tingini uppá, hon hevur fingist við myndlist í eini 30 ár og hevur hildið skeið í nógvum londum, t.d. í Íslandi, Norra og Svørríki og í Føroyum var hon fyrst í 90-unum og helt skeið í Runavíkar skúla.

Henda góða kona kemur nú aftur hendan vegin, og spennandi verður at síggja, hvussu hon fer at fáa skeiðsluttakararnar at sleppa hugflognum leysum, og við sínum seymimaskinum fara at mála hugtakandi myndir, bæði úr veruleikanum og úr hugans heimi.

Skeiðið í myndaseyming verður sum sagt í Ribarhúsi í Fuglafirði, sum er eitt vælegnað stað til eitt tílíkt skeið í hugnaliga gamla pakkhúsinum, mettað við atmosferu har eisini handilin hjá heimavirkisfelagnum er beint við hondina.

Skeiðið sum verður frá 22. til og við 26. apríl frá kl. 9.00 til 17.00, er fyri øll, sum hava áhuga, men luttakaratalið er avmarkað, so skjótt má berast at, um tú ætlar tær við.

Fáið meira at vita á okkara heimasíðu www.ribarhus.com/

Ella ring til Odvør tlf 444440/268690.



*Listakvinnan Solvejg Refslund*

---

†

## Andlát og jarðarferðir

**Dusina Kjærsgaard**, vanliga nevnd Dus, fødd Mortensen á Geil á Argjum, andaðist mánadagin, 84 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Hvalsø kirkju fríggjadagin kl. 10.30.

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, sum við gávum, telegrammum og blómum gleddu meg á 75 ára føðingardegnum.
Eina serliga tøkk til tykkum sum hjálptu til við matgerð o. ø. og gjørdu mær kvøldið hugnaligt.

**Heilsan**
**Kristianna Joensen**
**520 Leirvík**

---

# Lindin stuðlar grønlendskari útvarpsrás

**Leygardagin 8. mars verður ein stuðulssending í Lindini, til frama fyri stovnsetan av eini kristiligari útvarpsstøð í Nuuk í Grønlandi**

**ÚTVARP**
*Snorri Brend*

Lindin hevur seinastu árini savnað pening inn til ymisk evangeliskt arbeiði kring heimin.

Leygarkvøldið er ætlanin at hjálpa samkomum í Grønlandi, við m.a. at veita peningaligan stuðul og tekniska hjálp.

Fríkirkjurnar undir INO ætla nevniliga at byrja eitt útvarpsarbeiði. INO "Inuunerup Nutaap Oqaluffa" fevnir um sjey samkomur, sum liggja í Nuuk, Maniitsoq, Sisimiut, Aasiaat, Ilulissat, Kullorsuaq og Upernavik.

Í hesum sambandi fer Lindin at hava eina stuðulssending komandi leygardag, har lurtararnir fáa høvið at stuðla við at ringja inn og tekna teg fyri eina ávísa upphædd. Sendingin byrjar kl. 15 og endar kl. 23.

Í sendingini fara vit at hava áhugavert prát við fólk í Grønlandi og við fólk her á landi, sum hava eitthvørt serstakt at siga frá í sambandi við Grønland, upplýsir Tór Arni Samuelsen, dagligur leiðari í Lindini.

Møguleiki verður eisini at hoyra sang og tónleik beinleiðis úr Evangeliihúsinum. Millum sangararnar eru Martin Joensen, Sigrid Rasmussen, Theodor Petersen, Birgit Thomsen, Kristina Bærentsen og Karl Johannesen.

Allir stuðlar hjá Lindini og onnur áhugaði eru vælkomin í Evangeliihúsið leygardagin millum kl. 16 og 18 til ein drekkamunn og at hoyra góðan sang og tónleik.

### Kom væl við

Í fjør varð gjørt av, at peningurin skuldi latast til "Børn kring heimin".

Hetta tiltakið fevndi um stuðul til trý støð: Eitt gentuheim í Nakuru í Kenya, summarlegur fyri børn í Rumenia og stuðul til arbeiðið millum børn í Kiev í Ukreina.

- Stuðulin kom væl við hjá øllum, kanska á ein serligan hátt hjá gentuheiminum í Nakuru, sum við peninginum fingu gjørt gentuheimið liðugt, júst áðrenn ófriðurin aftaná forsetavalið byrjaði av álvara, verður sagt úr Lindini.



## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá kæra mamma, omma, vermamma og langomma okkara

**Sofie Sevdal**
Fía av Regni, ættað úr Leirvík

andaðist og varð jarðað.
Vit takka tykkum øllum hjartaliga, sum á ymiskan hátt vístu okkum samkenslu og hjálpsemi.
Serstøk tøkk til tykkum á Vesturstovu fyri kærleika og umsorgan, tykkum, sum vitjaðu hana frá tíð til aðra og tykkum øll, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað her.

**Regin, Jógvan Páll, Hegin og Osla**

**Dagurin**

**7. mars. Perpetua**, deyð ár 202 ella 203. Trælkona í Kartago sum saman við hábornari konu Felicitas varð tikin av døgum fyri trúar sakir.


